# Menu á i-Pad

Á Koks eru tey sera frammalaga viðvíkjandi menukortinum, tí menukort og vínkort er ein i-Pad2 frá Apple. Og tað gevur sera nógvar og óendaligar møguleikar. Tá tú kemur til borðs fært tú ein i-Pad, har tú kanst trýsta teg til matskrá og vínkort.

Ynskri tú til dømis at fáa jomfrúhummara, so trýstir tú á jomfrúhummara. Hagani kanst tú so trýsta á eina leinkju, sum fær fram ein film um, hvussu hummarin er veiddur og hagreiddur alt til hann stendur á borðinum. Koks hevur latið gjørti fleiri smáar filmar, sum gestirnir kunnu síggja í i-Padinum og soleiðis fáa søguna um matin afturvið.

Við i-Padinum sleppa gestirnir eisini á netið og ikki minst á Facebook. Teir kunnu taka mydir við i-Padinum og leggja myndir út á netið.

Og at hetta hevur stór perspektiv við sær, tað ivast Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum ikki í.

– Vit hava eini 10.000 gestir á matstovuni um árið. Siga vit, at helmingurin eru útlendingar, og at tey í miðal hava 200 vinir á Facebook, so røkka vit á henda hátt út til eina heila millión útlendingar gjøgnum Facebook, púra ókeypis, sigur hann.



*Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, greiddi frá, hvussu gestirnir á matstovuni Koks kunnu nýta i-Pad til at velja sær mat og vín – men eisini, hvussu hann hugsar sær at fáa gestir at marknaðarføra matstovuan á Facebook. Á henda hátt kunnu tey á Koks røkka einari heilari millión útlendskum Facebookbrúkarum!*

## Føroysk heiti

Á Koks leggja tey dent á at brúka føroysk heiti til matin. Tað er Jonhard Mikkelsen frá forlagnum Sprotanum, sum hevur vegleitt.

Leif Sørensen vísir á, at vit ofta brúka fín útlendsk orð, sum vit kanska ikki skilja.

– Hví ikki vera erlig og siga tað akkurát sum tað er? Tað er tað, sum vinnur í longdini, heldur hann.



*Tey skeinkja sjampanjur í forhøllini á hotellinum*



*Uppi á hanabjálkunum í matstovuni ber til at nóta eitt glas áðrenn ella eftir máltíðina*



*Mortan í Hamrabyrgi kannar menu'ina í i-Padinum*

## Skapa áhuga fyri føroyskum rávørum

**Um vit skapa tørvin fyri føroyskum fáðvørum, so fara fólk at spyrja eftir teimum. Hetta skapar eisini áhuga uttanlands. Leif Sørensen sigur, at Jákupskel er eitt gott dømi. Føroyska Jákupskelin verður nógv brúkt í útlondum, tí tey hava smakkað hana í Føroyum.**













